# VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Um morgunin upp í hvassan vind av suðri, men um middagsleitið lot av ymsum ættum. Regn av og á og hitin millum 9 og 12 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í skrið ella storm av útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin fellur niður í eini 3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Hann veksur vindin sum frálíður upp í hvassan vind av suðri, týsdagin av útsynningi. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 8 og 12 stig.

# Havnarbørn á Slættaratindi

**Ein góðveðursdag herfyri vóru okkurt um 55 næmingar úr Kommunuskúlanum í Havn ein gongutúr uppi á hægsta fjalli í Føroyum, Slættaratindi**

SKÚLALÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið veðrið er til vildar, er ikki óvanligt, at lærarar og skúlabørn leita sær út í náttúruna at fáa ein øðrvísi uppliving enn hana, ið tú fært á einum skúlabeinki. Fyri tveimum vikum síðani vóru næmingar úr Havn á ferð á Slættaratindi.



*Lagið var gott á havnarbørnum, tá ið tey fyri tveimum vikum síðani í allarfagrasta veðri høvdu leitað sær niðan á hægsta stað í Føroyum, nevnliga ovast á Slættaratind.*

*Mynd: Dan Lamhauge*

## Fleiri flokkar

Næmingarnir, ið gingu niðan á Slættaratind hendan góðveðursdagin, vóru úr einum 6. og einum 9. flokki í Kommunuskúlanum, og harumframt var ítróttarbreytin í 10. flokki eisini við á túrinum.

Ítróttarbreytin er eitt val, sum 10. flokksnæmingar í høvuðsstaðnum hava. Næmingarnir kunnu velja millum fleiri breytir, so sum list, ítrótt og annað, og hesa breyt hava tey ein stóran part av skúlatíðini. Fyri at fáa so nógvar breytir sum gjørligt við einum rímuligum næmingatali, virkar hetta tilboð tvørtur um skúlar, og tí er ítróttarbreytin í Kommunuskúlanum mannað við næmingum úr bæði Kommunuskúlanum og úr Venjingarskúlanum.

Ítróttarbreytin í Kommunuskúlanum hevur eisini eitt samstarv við ítróttarbreytina í Runavík, og júst í hesum døgum vitjar skúlaungdómarnir úr Havn í Runavík, har tey saman við næmingunum úr Runavík hava ymiskar kappingar, so sum postarenning kring Toftavatn og frælsan ítrótt á Svangaskarði.

Komandi vár koma næmingarnir úr Runavík so ein túr til Havnar, har skipað verður fyri líknandi kappingum.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | -- |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 20 |
| Madrid | -- |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 25 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 22 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 994 hPa. vestan fyri Írland fer eisini í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjamorgunin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer í landnyrðing norðan og vestan fyri lágtrýstið rekur kaldari luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/9 kl. $06^{00}$– 22/9. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 15,0 mm – mált frá 21/9 kl. $06^{00}$– 22/9 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 95,5 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

16. september Mánin næstur jørðini
18. september Fullmáni
25. september Seinna kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. Sept | 11.27 | 23.52 | 10.27 | 22.52 | 10.42 | 23.07 | 01.01 | 13.27 | 02.01 | 14.27 | 09.42 | 22.07 | 08.42 | 21.07 | 11.42 | - | 00.16 | 12.42 | 11.12 | 23.37 | 00.01 | 12.27 |
| 24. Sept | - | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 11.33 | - | 01.52 | 14.18 | 02.52 | 15.18 | 10.33 | 23.13 | 09.33 | 22.13 | 00.07 | 12.33 | 01.07 | 13.33 | - | 12.03 | 00.52 | 13.18 |
| 25. Sept | 00.58 | 13.38 | - | 12.38 | 00.13 | 12.53 | 02.58 | 15.38 | 03.58 | 16.38 | 11.53 | - | 10.53 | 23.32 | 01.13 | 13.53 | 02.13 | 14.53 | 00.43 | 13.23 | 01.58 | 14.38 |
| 26. Sept | 02.17 | 14.57 | 01.17 | 13.57 | 01.32 | 14.12 | 04.17 | 16.57 | 05.17 | 17.57 | 00.32 | 13.12 | - | 12.12 | 02.32 | 15.12 | 03.32 | 16.12 | 02.02 | 14.42 | 03.17 | 15.57 |
| 27. Sept | 03.22 | 15.47 | 02.22 | 14.47 | 02.37 | 15.02 | 05.22 | 17.47 | 06.22 | 18.47 | 01.37 | 14.02 | 00.37 | 13.02 | 03.37 | 16.02 | 04.37 | 17.02 | 03.07 | 15.32 | 04.22 | 16.47 |

5 707265 100050 >